Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundir føðingardagar, brúðleypsdagar, starvssetanir og -dagar.

## Føðingar



*Hey! Eg eiti Marjun og eri fødd 8. desember. Eg var 52 cm long og vigaði 3760 gr. Mamma og pápi mín eita Maria og Jógvan Garðsá og vit búgva í Keypmannahavn.*

23. november fingu Barbara Christophersen og Niels Uni Dam ein son. Hann var 55 cm langur og vigaði 4425 gr.

4. desember fingu Siri H. og Jens Kristian Davidsen, Signabø, eina dóttur. Hon var 56 cm long og vigaði 3800 gr.

5. desember fingu Alexia Lillaa og Gisle Einarsson, Egersund, eina dóttur. Hon var 51 cm long og vigaði 3590 gr.

5. desember fingu Bjørg S. Patursson og John Zachariassen, Vestmanna, ein son. Hann var 50 cm langur og vigaði 3400 gr.

7. desember fingu Nanna Kallsberg og Agnar Joensen, Tórshavn, ein son. Hann var 54 cm langur og vigaði 4350 gr.

7. desember fingu Agné Masenaité og Fróði Baldvinsson, Klaksvík, ein son. Hann var 57 cm langur og vigaði 4500 gr.

8. desember fingu Elsebeth og Anker Jacobsen, Klaksvík, ein son. Hann var 54 cm langur og vigaði 3800 gr.

8. desember fingu Andrea og Símin A. Johansen, Strondum, ein son. Hann var 55 cm langur og vigaði 3875 gr.

9. desember fingu Rosa Birgitta Dal Christiansen og Jan Willemoes, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 54 cm long og vigaði 3800 gr.

9. desember fingu Jastrid og Pauli Høj, Saltangará, eina dóttur. Hon var 48 cm long og vigaði 2650 gr.

10. desember fingu Eydna og Alfred Hummeland, Hvalvík, ein son. Hann var 58 cm langur og vigaði 3950 gr.

## Andlát

4. desember
Andreas Olsen, vanliga nevndur Líðar, Tvøroyri, 87 ár.

6. desember
Alis Simonsen, Sørvágur, 78 ár.

7. desember
Dagny Hansen, Fuglafjørður, ættað úr Syðrugøtu, 70 ár.

9. desember
Petronella Lamhauge, vanliga nevnd Nella, Toftir,87 ár.

11. desember
Judith Nolsøe, úr Dali, 63 ár

# Asger Nielsen deyður

**28. februar 1945 – 20. september 2003**



20. september 2003 andaðist Asger Nielsen í Kværndrup á Fyn 58 ára gamal.

Asger var dani, ættaður frá Fåborg á Fyn, hann var útbúgvin bilmekanikari og kom til Føroyar síðst í 70-unum at arbeiða sum plátusmiður.

Hann arbeiddi í nøkur ár sum plátusmiður á bilverkstaðnum hjá Frits Jensen í Gundadali, síðan fór hann at arbeiða sum plátusmiður hjá Wensel Petersen við Oyggjarvegin. Har var hann so í nøkur ár, til hann fekk starv hjá Demic sum rørleggjari.

Hann var sera arbeiðssamur og arbeiddi eisini aðrastaðni. Hann hjálpti m. a. til á plátuverkstaðnum hjá Carlo Petersen í Torfinsgøtu.

Asger Nielsen var ein sera dugnaligur handverkari. Alt arbeiði sum hann gjørdi var væl úr hondum greitt, og ongin kundi koma aftur um aftur, har sum hann hevði verið.

Í 1991 noyddi búskaparkreppan í Føroyum hann at flyta aftur til Danmarkar. Hann átti ein lítlan bóndagerð í Kværndrup á Fyn, og búsettist hann har.

Eftir at hann fór úr Føroyum arbeiddi hann á onkrum bilverkstaði, og hann var eisini við til at byggja Stórabeltsbrúnna. Seinnu árini arbeiddi hann á eini alsfaltfyritøku, sum asfalteraði um alt Danmark. Eisini gjørdi hann smærri umvælingar fyri fólk hann kendi.

Hann doyði av eini arbeiðsvanlukku uttan fyri heimið leygardagin 20. september, tá hann arbeiddi upp á gravimaskinu. Familjan í Danmark sigur, at Asger tosaði um tíðina í Føroyum sum eina góða tíð í lívi sínum.

## Minningarorð um
# Peter Turtschaninoff

**Føddur 29. juni 1951 – Deyður 19. november 2003**



20. november 2003 fingu vit tey syrgiligu boðini, at Peter Turtschaninoff var deyður í Barcelona bert 52 ára gamal.

Peter var stjóri í Norðurlandahúsinum tíðarskeiðið 1. apríl 1994 - 31.mars 1999.

Hann var ein ótraditionellur, gávuríkur, kensluborin og stak livandi persónur. Líka so blíður og skemtingarsamur, líka so bersøgin kundi hann eisini vera.

Sanniliga hava vit nógv minni um Peter. Hann hevði ikki verið stjóri í Norðurlandahúsinum í meiri enn einar 2 mánaðir, tá ið hann megnaði at halda fyrstu røðuna á føroyskum. Hann var eitt rættuligt málgeni og tosaði umframt móðurmálið týskt, enskt, spanskt, danskt og føroyskt.

Tá Peter var útnevndur til stjóra í síni tíð, og áðrenn hann flutti til Føroya, kom hann í Norðurlandahúsið á stutta vitjan. Hann helt talu og kom við nøkrum hugleiðingum um, hvat hann ætlaði at leggja dent á, og tosaði hann eitt nú um livandi ljóð í náttúruni og um ungdómstiltøk. Tað tóktist, sum at komandi stjórin líkasum var á eini heilt aðrari planet enn vit onnur, men hugleiðingarnar vórðu seinni til tiltøk - við góðari undirtøku. Peter var eitt "finn-upp-á" menniskja.

Hvørja ferð vit tosa um sangleikin Skeyk, Fyrstu føroysku symfoniina hjá Sunleif Rasmussen og Prix Føroyar, kemur tú at hugsa um Peter.

Peter var ein sera góður sjónleikari, frásøgumaður og sangari. Onkuntíð, tá fólk roknaðu við eini rimmar talu, so fór Peter upp á at syngja í staðin.

Sum fyrr nevnt, var Peter frásøgumaður sum fáur. Søgurnar um Wille, Annti og Pekka fara vit so ikki at hoyra frá Peter aftur, og nú jólini standa fyri durum, nyttar einki at ringja til Peter og ynskja gleðilig jól. Vit minnast automatiska telefonsvararan hjá Peter: "Ni har kommit til den automatiska Julpeter - jag är inte inne just nu, men vänligen tala in et besked".

Peter góði, takk fyri góð minnir. Spell, at tú ikki fekk nógv, nógv ár aftrat saman við børnunum hjá tær, og spell, at tú ikki náddi at blíva abbi.

Friður veri við minninum um Peter Turtschaninoff

**Vit í Norðurlandahúsinum**

## Dagurin

**13. desember. Lucia**, deyð umleið 300. Ung genta úr Syracus í Sikiloy. Var trúlovað heidnum ungum manni, men narraði hann, varð klagað fyri kristnu trúgv sína og tikin av døgum. Siðurin við luciugongum við gentum við tendraðum ljósi í hárinum er komin úr Svøríki.

Navnið Lucia kemur av latínska orðinum *lux*, sum merkir ljós.

**14. desember. Crispus**. Óvist hvønn navnið sipar til, kanska biskupin Crispina, sum varð tikin av døgum umleið ár 300.

**15. desember. Nikatius**, deyður í 5. øld. Biskupur í Reims í Fraklandi. Varð fyribeindur av heidningaflokki av Húnalondum.



NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Alma Matras 90 ár



Mánadagin 15. desember fyllir Alma Matras, Klaksvík 90 ár. Alma er dóttir Sámal Jacob Jacobsen í Búðunum Klaksvík og Elsubeth (Elspu) Jacobsen, fødd Sivertsen, av Skipinum við Gjógv.

Alma var elst av einum systkinaflokki, ið taldi átta børn. Mamman doyði ung frá teimum. Alma var tá bert 12 ára gomul, fasturin hjálpti til í húsinum, til Alma var 16 ár, tá tók hon við og helt hús saman við pápanum og systkinum, til hon fór at arbeiða á Klaksvíkar Sjúkrahúsi, har hon var fyristøðukvinna á vaskarínum í 14 ár.

Í 1964 giftist Alma við Josias Matras, sum var einkjumaður. Tey vóru gift í átta ár. Josias doyði í 1972. Hesi árini búði Alma uppi á Vágsheyggi, men tá Josias var farin, flutti Alma aftur út í Búðarnar at búgva, har hon býr ídag.

Vit ommu- og abbabørn hjá Elspu og Sámal Jacob eru Almu ógvuliga takksom fyri alt, hon hevur verið fyri okkum øll hesu mongu ár, takk fyri góða Alma.

Hjartaliga tillukku.

Tey, ið vilja heilsa uppá Almu eru hjartaliga vælkomin í barnaheimið hjá Almu í Búðunum føðingardagin millum kl. 15.00 - 19.00.

## Gullbrúdleyp

Í dag, 13. desember, hava Osla og Haldor Johansen, Klaksvík, gullbrúdleyp.

Tey, ið vilja heilsa upp á brúðarparið, eru í dag vælkomin inn á Solo Deo Gloria, har opið hús verður millum kl. 14 og 20. Øll eru vælkomin.

## Brúdleyp

Í dag, 13. desember, giftast á Ráðhúsinum í Keypmannahavn, Annika Háberg og Andrias Johannesen, Tórshavn.

Veitslan verður fyri innbodnum á Hotel Imperial. Brúdleypsadressa: Frederiksborggade 52, 4. sal.

## Nøvn í vikuni

**Kennir tú onkran …**

Kennir tú onkran í familjuni, á arbeiðsplássinum, í grannalagnum ella hvar tað skal vera, ið hevur ein merkisdag sum t.d. rundan føðingardag, brúdleypsdag, starvsdag ella onkran, sum hevur fingið nýtt starv ella annað, so sig okkum frá.



Tú skal bara skriva navn og bústað og um gjørligt aðrar upplýsingar eisini um tann persónin tú heldur eigur at koma í blaðteigin "Nøvn í vikuni", so taka vit okkum av restini. Tú er eisini vælkomin at senda okkum nøkur orð og um møguligt mynd. Annars hava vit góðar journalistar og fotografar til slíkar uppgávur.

Navn:..............................................................................
Bústaður:..............................................................................
Bygd/býur:.......................................Tel:..........................
Evt. arbeiðspláss:..............................................................

Merkisdagurin er: ..............................................................

Innsendari: ...............................................Tel:......................

## Minningarorð um
# Dia Gaardbo
## Runavík



Øll hava vit eina ófrættakenslu tá ið telefonin ringir árla á morgni. Soleiðis var eisini henda morgunin mamma ringdi. Eg kendi á mær, og hoyrdi á henni, at eitthvørt var galið. Teirra, og okkara góði granni, Dia Gaardbo var farin. Hetta kom kanska ikki so óvart, hann hevði nú í longri tíð verið veikur, og tá Eyðun kvøldið fyri segði mær, at pápi sín ikki hevði tað so gott, so komu boðini ikki so heilt óvart á meg.

Henda morgunin, meðan eg fái mær at eta, fara tankarnir aftur til barnaárini. Myndir, sum kennast so livandi, renna fram fyri meg. Alt tað, sum eg fyri langari tíð síðan hevði gloymt, stendur so klárt fyri mær. Síggi upplivingar og minnist gleðiligar hendingar, saman við Dia. Tað er, sum eg hoyri og síggi henda fryntliga og blíða mann. Altíð við tíð góða. Hugnaligur og barnavinarligur. Tá, á barnaárum, var einki sjónvarp, men hann var ikki seinur at spæla við okkum dreingirr, og tað vóru ikki so fáir Yatsi-blokkar, sum vit saman við Dia og beiggja hansara Dánial spældu. Dia hevði sera stóra umsorgan fyri familjuni, og ikki minst fyri tær Dánial, sum manst kenna saknin. Dia dámdi væl at vitja barnaheimið úti á Gørðum á Nesi, og her slapp eg eisini við. Út til tey so sera fyrikomandi foreldrini hjá Dia, Óla og Elsu.

Dia var ikki bert grannin, sum búði sunnanfyri ánna. Hann var eisini ein partur av húsinum sunnan fyri ánna, sum eg og systkin míni altíð høvdu at fara til. Kendist sum ein partur av barnaheiminum. Heimið, har vit, uttan at hugsa um tað, fóru, skuldi tað hent, at mamman var úti eitt lítið ørindi.

Tað er nøkur ár síðan áin var løgd undir flag. Áin, sum á ein ella annan hátt gjørdist einasta mark millum húsini. Var hon ikki, vóru húsini, fyri okkum børn, helst at kalla eitt.

Meðan eg siti og fái mær at eta, renna enn fleiri minnir til mín. Heilt klárt síggi eg aftur Dia á svørtu Tempolettini koma niðan brekkuna. Minnist skundin, vit dreingirnir høvdu, fyri at sleppa at sita á knallertini seinastu 40 metrarnar niðan gjøgnum brekkuna. Teir eru 4 beiggjar, og høvdu tí besta møguleikan til at fáa henda framúr túrin, sum ein sovorðin er hjá einum smádreingi. Hóast at teir skuldu havt ein fyrimun, so gjørdi Dia ikki mun á, og glaður var eg.

Sum eg siti og skrivi, kenni eg pennin verða so fátækan til at lýsa minni um henda so sera dámliga mannin. Vil bert lýsa nakað av tí, Dia og húsið hinumegin ánna hevur verið og er fyri okkum, norðanfyri ánna.

Sum smádrongur, og til eg sjálvur fekk familju, var tað ein nattúrligur partur at fara yvir á gólvið hjá Bettimi og Dia. Kanska ikki so løgið, tí teir dreingirnir og eg, vóru, og eru enn góðir vinmenn.

Sum eg sjálvur fekk familju, var tað helst so, at tað gjørdist longur ímillum, at eg stakk inn á gólvið. Oftast eitt lítið prát í túninum, ávegis at vitja foreldrini. Prátið varð, sum verða man, mangan um fótbólt, tí Dia hevði stóran áhuga í tí sum synirnir fingust við, og allir hava teir havt eitt stórt hjarta fyri NSÌ.

Áin var fyri árum síða løgd undir flag. Soleiðis er nú eisini við mínum góða vinmanni og granna Dia Gaardbo. Hóast aldursmun, so kendist tað altíð so, at Dia ikki einans var grannin, men eisini vinmaðurin.

Eg komi at sakna, men størstur mann saknurin verða hjá tær, góða Bettimi, og tí er gott at hava øll tey góðu minnini at taka til. Eisini tit beiggjarnir, Ólavur, Kristian, Eyðun og Oddfríður koma at sakna pápan, sum var so góður við tykkum.

At vit vóru nógv sum hildu av hesum so siðiliga manni, er fylgið, sum fylgdi honum til seinasta hvíldarstað eitt gott dømi um.

Eri takksamur fyri at eg kann draga fram øll tey góðu minnir eg havi um Dia Gaardbo. Má Hann sum valdar, styrkja øll tykkum sum sakna, mann, pápa, verpápa og abba.

Við hesum fáu orðum vil eg lýsa frið yvir minni um mín góða grann, Dia Gaardbo.

**Sunleiv**

# Tøkk

Til mammu, systkin míni v/ familjum takki eg hjartaliga fyri, at tit gjørdu 60 ára dagin ógloymandi fyri mær. Tøkk til ítróttarfelagið, dansifelagið og tykkum øll, sum heilsaðu mær á degnum.

Við jólakvøðu!

**Magnus Jensen**
**Sumba**

# Tøkk

Til tykkum, sum á ymiskan hátt mintust til mín á 80 ára degnum, takki eg hjartaliga.

Guð signi tykkum øll og gevi tykkum eini góð og hugnalig jól!

**Kærar heilsanir**
**Brynhild Jensen**
**Sumba**